# Føroyskt granskingarsetur



Nú er ein føroyskur granskingarpolitikkur stungin út í kortið. Granskingarøkið skal mennast, og karmarnir skulu gerast munandi betri.

Ætlanin er, at granskingin skal knýtast at Fróðskaparsetrinum, sum skal hava avtalur við útlendskar stovnar um útbúgving og gransking, soleiðis, at føroyingar kunnu fara uttanlands í styttri og longri tíðarskeið, og útlendingar kunnu koma higar at granska.

Uppgávan hjá granskarasetrinum verður at stuðla og birta undir meiri og fjølbroyttari gransking, millum annað í heilsu og biotøkni.

Sambært álitinum skal vinnan eggjast til at gera íløgur í gransking og menning.

Allar avtalurnar skulu hava breiða politiska semju, og karmarnir skulu setast fyri trý ár í senn.

## Hægstu kravdu miðaltølini á Københavns Universitet í 2010:

1 Lægevidenskab **10,8**
2 Statskundskab/samfundsfag **10,7**
3 Antropologi **10,6**
4 Psykologi, Molekylær Biomedicin og Film- og medievidenskab **10,5**
5 Retorik **10,4**
6 Litteraturvidenskab **10,0**
7 Veterinær Medicin **10,1**

Kravda miðlatalið verður roknað út frá talinum á umsóknum í mun til talið av plássum. Jú fleiri umsóknir eru til hvørt lestrarpláss, jú hægri verður kravda miðlatalið (kvotienturin). Miðaltalið kann tí skifta nógv frá ári til ár, alt eftir hvussu nógvar umsóknir koma inn. Tí ber ikki til at vita frammanundan, júst hvussu høgt miðaltalið skal vera, fyri at tryggja tær pláss, tá tú søkir.

# Best umtóktu útbúgvingarnar í 2010

**1 LÆGVIDENSKAB**
Københavns Universitet 2.023 umsøkjarar - 10,8 kravt miðaltal

**2 JURA**
Københavns Universitet
1.258 umsøkjarar - 8,3 kravt miðaltal

**3 ALMEN ERHVERVS ØKONOMI**
Handelshøjskolen i København
1.024 umsøkjarar - 7,2 kravt miðaltal

**4 LÆGEVIDENSKAB**
Århus Universitet
941 umsøkjarar - 10,1 kravt miðaltal

**5 PSYKOLOGI**
Københavns Universitet
906 umsøkjarar - 10,5 kravt miðaltal


